# Hair av álvara í umbúna



**Sangleikirnir, ið hava verið sera væl umtóktir seinastu árini, ber ikki til at komast undan, tá tosað verður um føroyska list og mentan. Aftanfyri leikir sum »Fame« og »Jósef og tað ótrúliga litfagra dreymakotið«, stendur Føroya Studentaskúli. Enn einaferð kemur ein navnframur umsettur sangleikur, nevniliga »Hair«**





MENTAN

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Føroya Studentaskúli er í fullari ferð við framleiðsluna og fyrireikingarnar til stóra sangleikin Hair. Fríggjamorgunin var boðið til tíðindafund í bygninginum hjá Føroya Tele, ið eisini er høvuðsstuðul. Á skránni vóru røður, framførslur og ymiskt annað. Mikkjal Hvannastein, ið er skúlastjóri á Studentaskúlanum í Hoydølum, helt fundin og eina røðu, har hann greiddi frá ymiskum, ið har til hoyrir.

## Hair á Broadway

Søgan aftanfyri sangleikin Hair byrjar í høvdinum hjá tveimum djørvum og vónríkum amerikumonnum og einum kanadiumanni. Teir tríggir skrivaðu ein slóðbrótandi sangleik um rákið tá, uppreistur og frælsi. Í 1965 byrjaði verkætlanin og longu í 1968 var leikurin á Broadway, ið er ein hin størsti heiðurin innan sjónleik. Tað gekk ikki uttan trupulleikar at fáa leikin so langt, men drivið var á og tað vísti seg at hann var somikið nýskapandi og áhugaverdur. Millum annað høvdu sangleikir í tí tíðini millum 12 og 15 sangir, men Hair hevði heilar 33 sangir. Leikurin var framførdur á Broadway í heili seks ár.

Líka síðan heimurin fekk eyguni upp fyri hesum leiki hevur áhugin bara vaksið. Runt um í øllum heimspørtum hevur hann verið at sæð. Nógv var eisini gjørt burturúr 40-ára haldinum, ið væntandi fór lata eyguni hjá amerikumonnum enn meira upp fyri honum.

## Hár á føroyskum

Flestu fólkini, ið eru innblandaði nýta gerandisdagarnar í studentaskúlanum í Hoydølum. Umframt tey eru onnur, eittnú Tórshavnar Musikkskúli og Tekniski Skúli í Tórshavn, ið stendur fyri fyrireikingum innan el- og træ og hárfríðkan.

Mikkjal Hvannastein kundi siga frá skúlanum, at nógv tos var um leikin millum næmingarnar á skúlanum. Heili 55 næmingar viðvirka og yvir hundrað vóru við til hørðu útveljingina. So millum næmingarnar, eisini teir, ið ikki beinleiðis viðvirka, er nógvur spenningur og stórt forvitni.

Hjá honum sjálvum samanbar hann tiltakið hendan morgunin, við eina rakett, ið fer avstað. Eitt suð í búkinum, ótrúligur spenningur. Sjálvur hevði hann ikki verið við til nakra venjing, og ánaði ikki hvat hann skuldi vænta, men hann segði seg ikki vera minni enn hugtiknan av tí, sum hann hevði sæð. Fyri hann birtust somu kenslurnar, sum tá FAME-leikurin leikaði harðast á.

Fyri hesar 55 viðvirkandi næmingar, koma nógvu fyrireikingarnar ikki at kosta nógva skúlatíð, tríggir dagar fara tó við